# Skal verða tvær ferðir so dýrt at parkera ólógliga í Havnini

**Tað er alt ov bíligt at parkera ólógliga í Havnini, heldur løgreglan. Higartil hevur býráðið ikki viljað sett bótina upp, men nú kemur málið helst aftur til viðgerðar**

PARKERING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er næstan ómøguligt at koma umaftur, har skaðin er hendur. Heldur eigur býráðið at finna eina varandi loysn, heldur Leivur Hansen, sum er í minniluta í teknisku nevnd*

Bótin fyri at parkera ólógliga í Havnini, eigur at vera tvær ferðir so stór, sum hon er nú.

Tað heldur Løgreglan.

Fyri fáum døgum síðani hevði Løgreglan fund við teknisku nevnd hjá býráðnum um parkeringsviðurskifti.

Leivur Hansen, sum er í teknisku nevnd, sigur, at á tí fundinum duldi løgreglan ikki fyri, at hon helt, at tíðin var komin at hækka bøturnar og hon heitt á býráðið um at umhugsa málið.

Í løtuni er bótin fyri at parkera ólógliga í Havnini 200 krónur og Løgreglan sigur við blaðið, at tað er so lítið, at tað hevur ongan sum helst fyribyrgjandi ávirkan, tí fólk seta bilin, akkurát sum tað passar teimum.

Samstundis vísir Løgreglan á, at í øðrum Norðanlondum er bótin fyri at parkera ólógliga minst tvær ferðir so stór, sum í Havn.

Í Keypmannahavn er bótin 510 krónur, fyri at nevna eitt dømi.

Kommunan kann tó ikki av sínum eintingum hækka parkeringsbøturnar. Er ætlanin at hækka bøturnar, skal kommunan heita á vinnumálaráðið um at gera tað og ráðið skal so meta um, antin grundarlag er fyri at hækka bøturnar, ella ikki, sigur Leivur Hansen.

### Allur býurin upp í sonuna

Sjúrður Olsen, sum er formaður í teknisku nevnd, sigur, at spurningurin um at hækka bøturnar upp í 450 krónur, hevur verið til viðgerðar í býráðnum, men tað varð felt einmælt.

Hann er ikki heilt samdur í, at ein bót upp á 200 krónur, onga fyribyrgjandi ávirkan hevur.

– Eitt er at fáa 200 krónur í bót eina ferð, men hjá tí, ið fær fleiri bøtur, merkist tað sanniliga, sigur hann.

Og hann heldur, at tað er eitt rættiliga ógvuslig hækking at leypa úr 200 krónum, heilt upp í 450 krónur.

Leivur Hansen sigur, at nú løgreglan hevur heitt á býráðið um at umhugsa málið einaferð afturat, væntar hann, at tað fer at verða tikið upp aftur.

Annars er verður umhugsað at gera parkeringssonuna í Havn nógv størri, enn hon er nú.

– Ein møguleiki er at taka alla Havnina, innanfyri ringvegirnar, upp í sonuna, men tað er ikki endaliga avgjørt enn, sigur hann.

### Bilin inni hjá sær sjálvum

Sjúrður Olsen vísir eisini á, at í byggisamtyktini stendur, at hvørt húski skal hava pláss fyri tveimum bilum inni hjá sær sjálvum.

– Men hetta verður yvirhøvur ikki hildið og tað er heilt vanligt, at fólk gera garð heilt út til vegin og seta bilarnar á alfaravegi, eisini tey, sum byggja nýggj hús.

Hesum trupulleikanum ætlar hann sær eisini til lívs.

– Møguliga endar tað við, at býráðið gevur hesum húskum eitt hampiligt skoðbrá til at útvega pláss til tveir bilar inni á teirra egna stykki, sigur hann.

Hann er greiður yvir, at hetta kann skapa øsing, men hann heldur, at trupulleikin við øllum bilunum, ið standa á alfaravegi, er so stórur, at okkurt eigur at verða gjørt.

Leivur Hansen heldur ikki, at hetta er ein gongd leið.

– Tað er ótrúliga ringt at koma afturumaftur, har skaðin er hendur, men at býráðið hevur betri eygu við hesum framyvir, hevur hann onki ímóti, hóast býurin er stórur, so tað verður ringt.

Men hann spyr eisini, hvussu hesin trupulleikin tekur seg upp, tí kommunan eigur ikki at góðkenna eina bygging og sostatt geva endaligt loyvi, fyrrenn øll slík viðurskifti eru fingin í rættlag.

Hinvegin heldur hann, at býráðið eigur at seta seg niður at finna eina varandi loysn á parkeringstrupulleikunum, eitt nú við at byggja parkeringshús. Hann nevnir, at ein onkuntíð hevur verið tosað um at gera eitt parkeringshús niðri á Skálatrøð.



*Ólóglig parkering er ein stórur trupulleiki í Havn, men vit hava sett okkum fyri at gera okkurt alvorligt við tað, sigur Sjúrður Olsen, formaður í teknisku nevnd hjá býráðnum*

# Nógv parkeringspláss mitt í Havn standa tóm

**Hóast tað so at siga er ómøguligt at sleppa av við bilin í miðbýnum í Havn, eru tað nógv parkeringspláss, sum ikki verða brúkt**

PARKERINGSVIÐURSKIFTINI Í HAVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Øll sum koyra bil Í Havnini, vita, hvussu trupult tað er at finna parkeringspláss mitt í býnum.

Men kortini er tað eitt stórt parkeringspláss mitt í býnum, sum verður lítið og onki brúkt.



*Hóast tað er ímillum trupult og ómøguligt at finna parkeringspláss í Havnini, verðuir stóra parkeringsplássið á Bursatanga, í hjartanum í Havn, lítið og onki brúkt*

Talan er um parkeringsplássið á Bursatanga, har heilir 44 básar eru.

Har hevur tað verið loyvt at parkera í fýra tímar.

Men so varð parkeringstíðin stytt niður í ein tíma. Avleiðingin av tí hevur verið, at parkeringsplássið verður lítið og onki brúkt og tað eru sjálvdan meiri enn einir 15 av teimum 44 básunum í brúki.

Men nú hevur ein meiriluti í teknisku nevnd hjá Býráðnum samtykt at leingja tíðina, tað er loyvt at parkera á Bursatanga upp í tveir tímar.

Men Leivur Hansen, sum eisini er í minnilutanum, mælti til at longja tíðina upp aftur í fýra tímar, sum tað var upprunaliga.

Hann sigur, at tey, sum hava brúkt hetta parkeringsplássi, eru fyri ein stóran part starvsfólk í Tryggingini og á øðrum stovnum og fyritøkum har um leiðir og sum hava kunnað sett bilin har fyri fyrrapartin og so aftur fyri seinnapartin.

– Men tá ið parkeringstíðin varð skerd niður í ein tíma, førdi tað við sær, at tey, sum plagdu at parkera á Bursatanga, heldur funnu sær onnur parkeringspláss aðrastaðni í býnum, eitt nú á Glasheyggi og á Abbatrøð, har ovurstórir parkeringstrupulleikarnir eru frammanundan hjá teimum, sum arbeiða har um leiðir, sigur Leivur Hansen. Hetta sjálvsagt fyri at sleppa undan at fáa bót.

– At parkeringstíðin á Bursatanga verður longd ein tíma, er neyvan nóg mikið til at lokka bilarnar omanaftur, sigur Leivur Hansen.



# Línubáturin Kvikk seldur




*Kvikk skiftir eigarar eftir nýggjár. Tá yvirtaka Hans Oluf Johannesen, Óla Marner Christiansen og Torleif Sigurðsson bátin*

*Savnsmynd*

**Frá 1. januar 2004 skiftir línubáturin Kvikk eigara. Tað eru teir tríggir Hans Oluf Johannesen, Óla Marner Christiansen og Torleif Sigurðsson, sum hava keypt skipið**

FISKIVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** P/f Kvikkur hevur selt línubátin Kvikk. Nýggju eigararnir taka yvir bátin tann 1. januar 2004.

Torleif Sigurðsson sigur, at tað var stórur áhugi fyri línubátinum, og at hann var á veg út, men við nýggju eigarunum kann staðfestast, at Kvikk verður verandi í Klaksvík.

Ongar broytingar fara fram við keypinum. Tað vil siga, at skipari og manning verða tey somu. Skipið varð somuleiðis keypt við teimum rættindum, sum tað hevur. Tað er bólkur A3, sum gevur 132 dagar á Landgrunninum, 30 dagar á Føroya Banka, og so hevur skipið eina kvotu í Íslandi áljóðandi 216 tons.

– Tað er tað, sum vit skulu dúva uppá, sigur Torleif, sum verður útgerðamaðurin hjá Kvikki eftir 1. januar.

Hetta er fjórða skipið, sum Torleif Sigurðsson er við at keypa. Framman undan er hann partaeigari í Pison, Alfa Pilot og Fiskimúla. Hendan seinasta bátin keypti hann saman við øðrum fyri góðum mánaði síðani.

Pison kom inn á Klaksvík fríggjakvøldið. Hann má sigast at hava havt eitt avbera gott ár. Serliga hevði hann nakrar framúr góðar túrar á Føroya Banka herfyri.

Nýggju eigararnir av Kvikki taka sum sagt yvir bátin frá 1. januar 2004.

# Jólabryggj aftur best

**Fyri aðru ferð gjørdist jólabryggið frá Føroya Bjór nummar eitt í eini ølsmakking, sum Selskab for Vestjysk Ølkultur skipaði fyri**

KAPPING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Føroyskt øl frá Føroya Bjór er tað besta jólabryggið anno 2003. Hetta er yvirskriftin í tíðindaskrivi, sum Selskab for Vestjysk Ølkultur sendi út aftaná ølsmakkingina.

Framman fyri 12 onnur sløg av jólabryggið var Føroya Bjór kosið at vera tað besta. Um 100 limir í felagnum vóru tilstaðar hetta kvøldið øl smakkingin fór fram.

Hendan ølsmakkingin er ein sokallað blindsmakking. Og tað vil siga, at tey, sum smakka, verða ikki ávirkað av merkjum ella fløskuskapum, og tann hátt er tað einans smakkurin, sum ger av, um teimum dámar ølið ella ikki.

Umframt at Føroya Bjór hevur vunnið hesa ølsmakking innan jólabryggj tvær ferðir, hevur bryggjaríið somuleiðis vunnið eina tílíka kapping fyri páskabryggið.

Føroya Bjór vann ølsmakkingina við 309 stigum. Nummar tvey gjørdist Jule Ren frá Thisted Bryghus við 287 stigum.

JÓLATILBOÐ

NOA NOA®



Skinnjakki
rosa / natúr
str. S-XL
vanl. prísur 2.299,-
NÚ 1.599,-



Skinnfrakki
rosa / natúr
str. S-XL
vanl. prísur 2.999,-
NÚ 1.999,-



Gott jólagávuhugskot
Canvastaska
2 støddir
6 litir
fyrr 129,-
NÚ 49,-

29
Í Tróndargøtu
tel 318200 • 218199

mán - hós 9-18
fríggjad 9-19
leygard 9-14